## ES-pakki uppá 1500 milliardir kr. ávegis



Formaðurin í ES-nevndini hitar upp til ein størri hjálparpakka til hart trongda búskapin í ES-londunum. Enn er pakkin ikki viðtikin, ljóðar tað frá álítandi keldum og hann kann tí broyast. Endamálið er at fáa gongd á stirvna búskapin, ið er uppsteðgaður, orsaka av altjóða fíggjarkreppuni. Tær 200 mia. evrurnar svara til 1,5 % av bruttotjóðarinntøkuni hjá ES-londunum og upphæddin er hægri, enn áður hevur verið nevnt. Okkurt slag av hjálparpakka frá ES er væntandi dag. Hann kann t.d. innihalda uppskot um at lækka skattin av arbeiðsinntøkum og lægri meivirðisgjald.

kelda: www.bl.fo

## Sambandið eftirlýsir bussar

Sambandstingmaður vil hava floksfelaga í Vinnumálaráðnum at svara uppá, um landið hevur skyldu at syrgja fyri, at busssamband er við allar bygdir í Føroyum við vegasambandi. Helgi Abrahamsen vil eisini hava at vita frá Johan Dahl, um kunngerðin er lýst, sum sambært lógini um fólka- og farmaflutning, skal áseta almennu flutningsskylduna á landi. Og um hon ikki er lýst, nær hon so verður lýst. Sambandstingmaðurin vil eisini hava vinnumálaráðharran at svara uppá, um krøvini til fólka- og farmaflutning verða fylgd. Um ikki, so hvat hann ætlar at gera fyri at uppfylla krøvini.

# fýra flogvanlukkur

hjá teimum, og at vera hjá teimum báðum var, sum at vera heima. Tey fóru við mær, sum vit sínum egna soni, og eg hevði tað so sera gott hjá teimum.

Hann sigur, at Anni og Valdemar liva bæði, og sambandið hevur verið hildið við líka øll árini.

### Á løgregluskúla

Tað var í oktober í 1970, at Regin fór niður til Danmarkar á løgregluskúla.

- Tá tók skúlin bert hálvt annað ár. Fyrst gingu vit tríggjar mánaðir í skúla og vóru síðan úti í níggju mánaðir. Eftir hetta vóru vit aftur hálvt ár í skúla, og síðan ferðaðist eg um ymisku deildirnar hjá løgregluni. Eg kom soleiðis heimaftur til Føroya sum útbúgvin løgreglumaður í juli í 1972.

Sum løgreglumaður hevur Regin starvast ein stóran part av tíðini - ella 17 ár - í Havn, tey seinnu árini sum vakthavandi á støðini í høvuðsstaðnum.

Árini, hann í fyrsta lagi var knýttur at støðini í Havn, arbeiddi hann eisini onkur skifti á støðunum aðrastaðni í landinum.

- Eg byrjaði her í Sørvági sum varaleiðari á støðini í 1988, og endaði sum sýslumaður í Vágum í 1995.

Nú riggar Regin so av, og seinasti arbeiðsdagur hjá honum sum sýslumaður í Vágum er sunnudagin 30. november.

### Góð starvsfólk

- Tað liggur nokso fitt av pappírsarbeiði í starvinum hjá einum sýslumanni, og eg má viðganga, at pappírsarbeiði er ikki ordiliga eg. Men eg havi havt so serstakliga gott skrivstovufólk aftrat mær øll hesi árini, og tí hevur hetta slett ikki verið nakar trupulleiki.

Regin vísir á, at Kristina Olsen hevur starvast á sýsluskrivstovuni í meira enn 40 ár – og er framvegis á skrivstovuni.

- Hon hevur verið her øll árini, eg havi arbeitt her. Hon hevur verið mín høgra hond og hevur gjørt, at starvið hjá mær sum sýslumaður hevur fallið mær so.

Sýsluskrivstovan hevur ymiskar uppgávur, eitt nú fyri landsstýri og sorinsskrivaran við innheintingum av falnari skuld hjá fólki og annað.

- Eg haldi, at ein góður eginleiki hjá einum sýslumanni, sum eisini hevur slík innheintingarmál um hendi, er at duga at seta seg inn í støðuna hjá fólki. Tað ræður jú um at fáa í lag góðar avtalur, har tað yvirhøvur letur seg gera.

Regin sigur, at nú fiskavirkið í Miðvági er stongt, og støðan í samfelagnum annars tykist trekari, eru eisini ábendingar um, at vit kunnu vænta okkum fleiri mál av slíkum slagi.

- Tú kennir fólkini ella onkran, sum kennir tey, og soleiðis kennur tú eisini við teimum, sum koma í klemmu. Tú eigur sum sýslumaður ikki at vera ísakaldur yvirfyri, hvat fólk nú einaferð dragast við í tí dagliga.

### Nógv ferðsludráp

Ein løgreglumaður og sýslumaður gjøgnum so mong ár hevur sjálvandi upplivað ein heilan hóp av óbehagiligheitum, men tað eru sjálvsagt tær góðu løturnar, ið tú sum løgreglumaður og sýslumaður vilt minnast.

- Eg havi tíbetur havt evnini at »gloyma« tær keðiligu løturnar, samstundis sum tær góðu løturnar sita eftir. Sjálvandi gloymir tú ongantíð tær hendingar og vanlukkur, sum tú hevur upplivað gjøgnum árini, men tú noyðist at ansa eftir, at hesar ikki fjala útyvir tær góðu løturnar í starvinum.

Regin sigur, at í tíðini hjá sær sum løgreglumaður og seinni sýslumaður hevur hann havt við eini 25 ferðsludráp at gera, eins og hann meira og minni hevur havt við fýra flogvanlukkur at gera. Tey fyrstu 8-9 árini í Vágum vóru eini 7-8 ferðsludráp í oynni, har ungir menn doyðu, og onkur gjørdist avlamin

> *- Vit komu í illveður á Kappanum og løgu í hesum illveðri í eini trý samdøgur. Eg visti, at báturin toldi hetta veðrið, og tí var eingin ótti umborð.*
>
> *(Regin Jespersen)*

- Í fleiri førum kendi tú fólkini ella tey avvarðandi. Tú noyddist at boða teimum avvarðandi frá tí, sum hent var, og tað eru slíkar hendingar, ið standa sum daprir dagar í lívinum hjá tær.

### Tungar vanlukkur

Sýslumaðurin, sum nú leggur frá sær, sigur, at tíbetur hevur hann dugað at tikið hesar uppgávur, sum ein løgreglumaður í fyrstu syfti noyðist at taka tær.

- Tá tað arbeiði, sum neyðugt er at gera, í fyrsti syftu er av, er gott at hava havt góðar starvsfelagar at tosa við – og tá tú síðan ert komin heim aftur til húsa, hevur tað havt stóran týdning at havt konuna at tosa við.

Regin minnist tann eina dagin sera væl.

- Um 05-tíðina á morgni hendi eitt ferðsludráp í Miðvági, har ungur maður doyði, og onnur vórðu løstað. Eg kom heim út á morgunin, fekk mær brúsubað og skuldi møta á flogvøllinum aftur um middagsleitið. Meðan eg eri á flogvøllinum, dettur Golfstream-flogfarið niður, og níggju fólk láta lív.

Hann sigur, at millum fólkini í flogfarinum var stýrimaðurin, sum var føroyingur.

- Hetta var fyrsti túrur hjá honum sum stýrimaður. Eg kendi unga mannin, og eg kendi pápan ógvuliga væl. Sama var, tá tyrlan datt niður á Borðoyarvík og fýra fólk lótu lív. Flestu av hesum fólkunum kendi eg eisini ógvuliga væl, tí vit arbeiddu saman her vesturi.

### Konan flogterna

Regin nevnir eisini flogvanlukkuna á Stord í Noregi, har ein føroysk flogterna doyði.

- Kona mín er eisini flogterna hjá Atlantsflog, nú yvirflogterna, og hon kundi tað sama verið við hendan túrin. Hendingin hevur sjálvandi ávirkað hana og okkum, og hetta eru viðurskifti, vit práta um av og á.

Regin og Annika, sum konan eitur, eiga tveir synir og ein abba-og ommuson.

- Annar siglir sum yvirstýrimaður hjá Maersk, og hin gongur í skúla í Danmark. Abbasonurin er sjey ára gamal og er uppkallaður eftir mær, sigur ein errin Regin, sum skjótt verður fyrrverandi sýslumaður.

Nú hann gevst á sýsluskrivstovuni, fer Regin Jespersen at hjálpa til í Timburhandlinum hjá Jørgini Niclasen í Sørvági.


ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

**Grunnurin frá 1989 til sosial endamál í Føroyum**

Gjørt verður kunnugt, at nú kann søkjast um stuðul úr grunninum frá 1989 til sosial endamál í Føroyum.

Grunnurin er ein samanlegging av 3 grunnum: "Sparekassefonden", "Julemærkelegatet til fordel for syge og svagelige børn på Færøerne" og "Legat af 1989 for sociale formål på Færøerne". Endamálini í teimum nú fyrrverandi grunnunum verða førd víðari í tí samanlagda grunninum.

Endamálið í tí samanlagda grunninum er at veita stuðul til persónar búsitandi í Føroyum, sum vegna ólukku, sjúku ella aðrar umstøður hava serstakan tørv á fíggjarligum stuðli.

**Í viðtøkum grundsins eru málbólkarnir orðaðir soleiðis:**

- eftirsitandi, sum onga skaðabót fáa sambært vanl ukkutryggingarlógini, umframt á annan hátt at virka fyri at bøta um neyð millum íbúgvar í Føroyum,
- sjúk og veik børn undir 15 ár, sum eru búsitandi í Føroyum, ella til felagsskapir, sum varða um teirra áhugamál,
- einkjur og eftirsitandi børn,
- einkjur og børn eftir føroyskum fiskimonnum og sjómonnum – herundir einkjur og børn búsitandi í Suðuroy ella á Sandoynni,
- sjúk, herundir hjálp til sjúkuviðgerð og endurvenjingaruppihald (serliga á Hvíldarheiminum Naina í Tórshavn) og
- serliga treingjandi einkjur, einkjumenn ella einlig.

**Umsóknir skulu sendast til:**

Stýrið fyri grunnin frá 1989 til sosial endamál í Føroyum
Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera stýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin **15. desember 2008, kl. 12.**

***Stýrið***

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO


Lesið Sosialin -so eru tit við!